


Starvslýsing

# Løgfrøðingar til Innlendismálaráðið

Innlendismálaráðið søkir eftir løgfrøðingum. Høvuðsuppgávurnar eru ráðgeving, málsviðgerð og lógarsmíð á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

Talan er um fakliga spennandi og fjølbroytt størv, har góðir møguleikar eru fyri viðkomandi eftirútbúgving, Eisini verður møguleiki fyri at arbeiða hjá øðrum viðkomandi myndugleikum og stovnum uttanfyri Innlendismálaráðið.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv, og vera væl fyri málsliga. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt og miðvíst. Lesandi, ið vænta at verða liðug í næstum, eru vælkomin at søkja.

Løn og setanartreytir vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Vilt tú hava meira at vita, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 29. juni 2007 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:
Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Í Innlendismálaráðnum starvast í løtuni 16 fólk. Innlendismálaráðið umsitur m.a. lógarmál, kommunumál og umhvørvis-, lendis- og náttúrumál.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo

Nú kanst tú søkja um

# Stuðul til gransking, menning og nýskapan

Í ár eru økini "Matur", "Samfelag" og "Fólkaheilsa" raðfest, soleiðis at verkætlanir innan hesi øki hava serligan fyrimun.

**Stuðul verður latin:**
- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking, menning og nýskapan á ella í tilknýti til føroyskar gransk-ingarstovnar og vinnufyritøkur
- gransking, menning og nýskapan, ið hava týdning í føroyskum høpi.

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- ph.d.-verkætlanir.

**Tað er ein fyrimunur, at:**
- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingar- umhvørvi og vinnuna
- umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini.

Umsóknir skula skrivast á skandinaviskum ella enskum máli á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og á heimasíðuni, www.gransking.fo.

Nærri frágreiðing um raðfestu økini og skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

**Umsóknarfreist er:**
3. september 2007, kl. 12.00

Hugsjón

Vit vilja
- at gransking í Føroyum skal vera á altjóða stigi
- birta upp undir menning og nýskapan
- leggja dent á øki, har vit hava tilfeingi at gera rannsóknir
- at fremsti førleiki og vitan um land og fólk skal finnast í Føroyum

Vit eru sannførd um
- at gransking, menning og nýskapan eru avgerandi liðir í at brynja okkum til avbjóðingarnar í einum heimi í støðugari broyting

Vit ynskja
- dyggari grundarlag fyri avgerðum
- betri tillagingarførleika í altjóðageringini
- betri kunnleika til burðardygga umsiting av náttúrutilfeingi
- størri virði í føroyskari framleiðslu og útflutningi
- hægri vitan og tilvitan um mentan og samfelag

Grundstøðið er
- at grundgransking er neyðug fyri at fáa til vegar vitan til gagn fyri samfelagið
- at nýtt gransking mennir vinnulív og samfelagstænastur
- at samstarv og samskipan eru fyritreytir fyri nyttuvirði av gransking, menning og nýskapan

sansir.fo

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking, menning og nýskapan.

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo